LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 7. juli 2020
J.Nr.: LUM-10- 19/00101-13
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um vantandi svar og ónøktandi byggimálsviðgerð hjá Tórshavnar kommunu

Við skrivi, dagfest 5. november 2019, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> Hjáheft sendi eg eina kæru um Tórshavnar kommunu, sum varð dagfest teimum 5.7.2016. Einki svar er komið frá kommununi, fyrrenn eg nú í 2019, tá eg upplýsti at eg fór at senda kæruna víðari til LUM. B, deildarleiðari, í kommununi svaraði tá, men har sýnist einki koma aftur frá honum.
> ..."

Klagan og samskifti millum klagaran og Tórshavnar kommunu er lýst undir 'Málsgongd'.

## Málsgongd

Tann 5. juli 2016 sendi klagarin soljóðandi klagu til Tórshavnar kommunu:

> "Kæra — um bilverkstað DB, Tórshavn.
>
> Eg vil senda kommununi við hesum eina kæru um viðurskiftini í gøtuni D. Har er eitt sera virki bilverkstað, sum ger at tað ikki er búgvandi har. Har kunnu standa einir 25 bilar uttanfyri og so vil eg ikki tosa um allan trafikkin, ið har kemur ígjøgnum dagin. Hann, sum hevur verkstaðið eitur E og hann hevur fleiri mans í arbeiði. Har koma sýnsfólk frá tryggingum, bilar við eykalutum, fólk frá øðrum bilverkstøðum og nógv viðskiftafólk ígjøgnum dagin. Nógvur trafikkur og nógvur larmur er. Tá eg t.d. skal inn til okkara matrikulnummar frá gøtuni D, standa bilar ofta fyri, og so má eg bíða inntil kundin kemur út frá verkstaðnum. Ofta eru fleiri bilar parkeraðir inni á okkara matrikulnummari. Hartil standa bilar tíðum í báðum síðum, talan er um at tá tosa bilførarar saman, sum báðir sita í hvør sínum bili.
> Trygdin er ikki í lagi — eg stúri fyri at ein dag verður ein ólukka, tí bilverkstaðið liggur beint við F, og tá man snúrar inn frá F má man ofta høgga bremsurnar í, tí bilar standa parkeraðir í báðum síðum. Vit hava verið tolin, men nú er ov mikið.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Kommunan verður biðin um at taka og avgreiða hesa klagu, so hetta bilverkstaðið, sum ikki hevur loyvi at vera har, flytur har ídnaðarøki eru til sama endamál.
Eg vil so eisini siga, at longri inni í gøtuni er eitt annað verkstað og tað er G. Gjøgnum árið, serliga summarið er eisini nógvur trafikkur av .... ígjøgnum gøtuna. Haldi at eisini at her skuldi hann verið fluttur inn á eitt ídnaðarøkið, sum er gjørt til endamálið.
Við vón um at henda klaga verður avgreidd soleiðis, at verandi verður aftur í gøtuni D.
...”

Tann 30. januar 2018 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“...
Hjáheft sendi eg avrit av klagu eg sendi til kommununa 5. juli 2016. Eg havi einki hoyrt frá kommununi annað enn tað, at tit hava móttikið klaguna.

Sigi sum er, ikki eru nógvar klagur sendar frá mær, men nú er tolið uppi. Vit búgva DA og DB er eitt sera virkið bilverkstað har sera nógvur trafikkur og ferðsla er. Larmurin er øgiligur — serliga um summarið, tá verkstaðshurðarnar eru opnar. Sera nógv dálking er frá teimum. Nógv olja er ofta á vegnum og inni á okkara matrikkuli, havi sæð teir sproyta okkurt á oljuna fyri at hon kann hvørva so skjótt sum gjørligt. Hetta er dálking so tað stendur eftir.
Í morgun í hálkuni var eisini nógvur traffikkur har, og ikki var komandi út fyri bilum, sum skuldu á verkstaðið kl. 8.

Vit hava fingið at vita, at hann hevur ikki loyvi at hava verkstað har, men enn er einki hent og fari eg enn einaferð at heita á tykkum, um at bera so í bandi at flyta hetta verkstaðið til eitt ídnaðarøkið har tað hoyrir heima.

Í endanum á gøtuni er eisini eitt verkstað, har .... og annað verða umvæld. Eisini tað skuldi verið flutt á eitt ídnaðarøkið, har eisini tað hoyrir heima.
...”

Tann 27. september 2018 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“...
Havi einki hoyrt frá kommununi enn. Eg sendi tykkum klaguna 5. juli 2016.

Verkstaðið hevur 3 lyftur og fleiri fólk í arbeiði. Har er ikki verandi fyri traffikki á gøtuni.

Annars eru vit spurd um vit kunnu leiga húsið, sum stendur niðri við vegin, út til eitt snikkaravirki, vit svaraðu nei, tí økið var eitt sethúsaøki. Men nú tá einki er hent í málinum, fara vit kanska at umhugsa tað.

Tað er løgið at ein borgari als einki hoyrir aftur frá kommununi. Skal man í bløðini við hesum fyri at fáa svar?
...”

Tann 15. august 2019 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“Hví kemur einki svar??? Fái eg ikki svar innan 1. september í ár verður málið sent LUM! Er hetta rættur mátin at viðgera borgarar í Havn???

Haldi tað er nógv fyri at slíkar hóttanir skulu til, fyrrenn eitt møguligt svar kemur!
...”

Tann 16. august 2019 sendi Tórshavnar kommuna klagara soljóðandi teldupost:

“...
Eri púra samdur við tær í, at alt ov long tíð er fráliðin síðan tú á fyrsta sinnið sendi kommununi klaguna.
Eg vil við hesum kunna teg um, at klagan ikki er gloymd og at vit hava verið í samband við eigaran av bilverkstaðnum fyrr í ár, har hann bleiv biðin um at senda kommununi eina frágreiðing um virksemi á ognini.

Vit hava tó ikki frætt frá honum enn, men skal beinanvegin taka hond um hetta, soleiðis at vit so ella so kunnu fáa málið avgreitt.
...”

Tann 20. august 2019 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“...
Takk fyri at eg umsíðir fekk svarið. Nú eru 3 ár liðin og fyri okkum at síggja er virksemið hjá bilverkstaðnum bara vaksið — so hann kann ikki siga annað enn tað sum er.

Vónandi fái eg skjótt svar (innan 1. sept. 2019) og vónandi verða bilverkstøðini (bæði) í gøtuni flutt skjótast gjørligt.

Eg veit at tá E bygdi húsið var H, frá Tó. Kommunu og segði honum, at hann ikki kundi gera verkstað har, men E lurtaði ikki eftir og bygdi húsið bæði við lyftum o.ø.

SO tað er nakað hann hevur vita áðrenn húsið varð bygt.
...”

Tann 26. august 2019 sendi Tórshavnar kommuna klagara soljóðandi teldupost:

“...
Eg vil bert kunna teg um, at málið verður ikki endaliga avgreitt áðrenn 1. sept. 2019, men sum sagt, so skal eg taka hond um hetta og tú ert vælkomin at ringja beinleiðis til mín á tlf. I um okkurt er.
...”

Tann 27. august 2019 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“...
Haldi at kommunan hevur havt nóg so langa tíð at avgreiða hetta málið, heili 3 ár 2 mð. Eg vil tó seta eina nýggja freist til at fáa hasi viðurskiftini uppá pláss, soleiðis at bilverkstøðini í okkara, annars friðarligu, gøtu verða flutt og seinasta freistin eg seti er 1. nov. 2019. So hendir tað at málið fer til Løgtingsins umboðsmann.
...”

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 12. november 2019, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 3. desember 2019 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "...
> **Frágreiðing**
>
> Í skrivi dagfest 12. november 2019 verður Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum frágreiðing um viðgerðina av omanfyri nevnda klagumáli, okkara mál nr. 16/02791.
>
> Kært verður um manglandi svar frá Tórshavnar kommunu í samband við klaguna um bilverkstað á matr. nr. Í, DB, og matr. nr. J, DD, Tórshavn, sum bleiv latin Tórshavnar kommunu 5. juli 2016.
>
> Kærarin frætti einki frá Tórshavnar kommunu fyrr enn í august í 2019, tá undirritaði kunnar um status í málinum.
>
> Tað er sjálvsagt sera óheppið, at kærari ikki fær svar frá kommununi, hóast hann fleiri ferðir rykkir eftir svari, og tað er ilt at siga, hvør orsøkin er til hetta, tí tað framgongur ikki av teimum skjølum, sum liggja í klagumálinum.
>
> Gongd kemur ikki í málið fyrr enn fyri umleið einum ári síðan, og tá verður skriv sent eigaranum av bilverkstaðnum, DB, har biðið verður um eina frágreiðing um virksemið á ognini. Tað vísir seg tá at vera lættari sagt enn gjørt, men tað er ikki óvanligt í slíkum málum.
>
> Tórshavnar kommuna gevur sær í november 2018 ikki far um, at kærari einki svar hevur fingið frá kommununi, fyrr enn kærari enn einaferð sendir kommununi rykkjara í august 2019.
>
> Kærari fær tá svar frá Tórshavnar kommunu um status í málinum, og í eftirfylgjandi samskiftinum verður eisini kunnað um, at málið ikki verður avgreitt áðrenn 1. september 2019, og at kærari kann ringja beinleiðis til málsviðgera hjá Tórshavnar kommunu í samband við málið.
>
> Tórshavnar kommuna kannar í løtuni, hvørji loyvi fyriliggja í samband við virksemi og bygging á ávikavist matr. nr. Í og J.
>
> At síggja til, hevur kommunan ikki givið loyvi til tað virksemið, ið verður framt á ognunum í dag. Tískil verður væntandi farið í gongd við at fáa lógliggjørt byggingina og nýtsluna á ognunum so ella so.
>
> Eftir ætlan verður klagan frá kærara løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina á næstkomandi fundi tann 14. januar 2020, har nevndin verður kunnað um, at umsitingin hevur ætlan um at fáa lógliggjørt virksemið á ognunum. Talan verður um tvey atskild mál.
>
> Kærarin verður í allar nærmastu framtíð kunnaður um omanfyri nevndu tilgongd og í tí sambandi eisini kunnaður um, at slík mál vanliga eru drúgv.

**Kronologisk málsgongd í klagumálinum**

5. juli 2016 skjal nr. 16/02791-1
Kommunan móttekur teldupost frá A, har A kærir um viðurskiftini í gøtuni D. Kæran snýr seg í høvuðsheitum um eitt bilverkstað DB, men nortið verður eisini við virksemi longri inni á gøtuni, DD. A vísir á ampar, sum standast av óskipaðari ferðslu og parkering, umframt larm.
Automatisk móttøkukvittan verður send A.

12. juli 2016 - skjal nr. 16/02791-2
Eru umboð frá Byggi- og umhvørvisdeildini á staðnum og staðfesta, at 12 bilar og 1 skutari vóru parkeraðir uttan fyri DB. Harumframt vóru bilar inni á verkstaðnum.

30. januar 2018 - skjal nr. 16/02791-3
A fýlist í telduposti á, at A einki hevur frætt aftur frá kommununi. A vísir framhaldandi á amparnar av ferðslu og larmi og leggur afturat, at nógv dálking stendst av virkseminum á bilverkstaðnum.
(Upprunaliga kæran er viðløgd, og borgarstjórin K og forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini L eru knýttar uppí teldupostin.)

31. januar 2018 - skjal nr. 16/02791-4
Kommunustjórin sendir klaguna víðari til tekniska stjóra og spyr um status.

27. august 2018 - skjal nr. 16/02791-5 *(skal vera 27. september, mín viðm)*
Í telduposti rykkir A enn einaferð eftir at fáa svar. A vísir á nógvu ferðsluna, og at fleiri fólk eru í arbeiði á verkstaðnum.
(Borgarstjórin og forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini eru knýttar uppí.)

6. november 2018 - skjal nr. 16/02791-6
Kommunan sendir skriv til eigaran av bilverkstaðnum, har tað verður álagt honum at senda kommununi eina frágreiðing viðv. virkseminum á matr. nr. Í, DB, Tórshavn.
Freist á eina viku er ásett.

18. mars 2019 — skjal nr. 16/02791-7 (notat)
Tórshavnar kommuna ringir til eigaran av bilverkstaðnum, E. Víst verður á, at einki loyvi er givið til virksemið, og at vit ikki hava móttikið nakra frágreiðing, sum vit bóðu um í skrivinum frá 6. november.
Avtalað verður, at E svarar skrivinum innan eina viku.

15. august 2019 skjal nr. 16/02791-8
A fýlist í telduposti enn einaferð á, at A einki svar fær. A upplýsir, at fær A einki svar innan 1. september, verður málið sent Løgtingsins Umboðsmanni.
(Borgarstjórin og forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini eru knýttar uppí.)

16. august 2019 - skjal nr. 16/02791-9
Í telduposti tekur Tórshavnar kommuna undir við, at alt ov long tíð er fráliðin, síðan A á fyrsta sinni sendi kæruna til kommununa.
A verður kunnað um, at klagan ikki er gloymd, at kommunan hevur verið í samband við eigaran av bilverkstaðnum, og at kommunan ikki hevur frætt frá eigaranum, men at hond verður tikin um málið so ella so fyri at fáa tað avgreitt.
Víst verður á, at A er vælkomin at ringja á beinleiðis telefonnummar.

(Borgarstjórin, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og tekniski stjórin eru knýtt uppí.)

20. august 2019 - skjal nr. 16/02791-13
Teldupostur frá A, har A takkar fyri, at A umsíðir fekk svar. A vísir á, at trý ár eru liðin, og at síggja til er virksemið hjá bilverkstaðnum bara vaksið. A vónar at fáa skjótt svar (innan 1. sept. 2019).

26. august 2019 - skjal nr. 16/02791-13
Tórshavnar kommuna kunnar í telduposti A um, at málið ikki verður endaliga avgreitt innan 1. september 2019, men at hond verður tikin um tað. Víst verður enn einaferð á, at A er vælkomin at ringja beinleiðis til kommununa, um okkurt er.

27 august 2019 - skjal nr. 16/02791-13
Í telduposti ger A vart við, at A heldur, at kommunan hevur havt nóg langa tíð at avgreiða málið, heili 3 ár og 2 mánaðir. A setir nýggja freist at fáa viðurskiftini upp á pláss, soleiðis at bilverkstaðirnir í teirra annars friðarligu gøtu, verða fluttir. Seinasta freist verður sett til 1. november 2019, síðan letur A málið til Løgtingsins Umboðsmann.

9. oktober 2019 skjal nr. 16/02791-7 (notat)
Eftir at hava ringt til E nakrar ferðir í august/september uttan úrslit, fer Tórshavnar kommuna á staðið. E var at hitta, og bleiv hann kunnaður um, at kommunan framhaldandi einki hevði móttikið frá honum. Hann vísti á, at hann hevði sent eina frágreiðing og skilti ikki, hví vit ikki høvdu móttikið hana.
E bleiv á staðnum enn einaferð kunnaður um, hvat tilfar var neyðugt at senda kommununi. Avtalað verður, at vit í hvør í sínum lag skulu eftirkanna okkara teldupostkassar.

29. oktober 2019 - 16/02791-10
Tórshavnar kommuna sendir E ein teldupost vísandi til prátið 9. oktober, har tað verður kunnað um, at eingin teldupostur frá E er at finna.
Tað verður tískil enn einaferð álagt E at senda kommununi frágreiðing v.m. við freist á eina viku.
Avrit av skrivinum frá 6. november 2018 verður lagt við.

4. november 2019 - skjal nr. 16/02791-12
E sendir kommununi stutta frágreiðing um virksemið á ognini og vísir á, at hann áður hevur sent sama skriv.
...”

Við skrivi, dagfest 5. desember 2019, vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 16. desember 2019 fekk klagarin longda freist at svara vegna serligar umstøður hjá klagara.

Tann 10. mars 2020 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

”…
Nú skrivar kommunan at hon hevur upprættað 2 sakir um bilverkstøðini á gøtuni hjá okkum. Tað fari eg at fylgja við við m.a innlitið.
Annars so skulu tit hava takk fyri at tit takað málið upp, tí trupulleikin er stórur í gøtuni. Trygdin er ikki í lagi, m.a. alt ov nógv ferðsla beint við inn-og útkoyringina á F, serliga síðan M kom.
...”

Tann 15. juni 2020 upplýsir Tórshavnar kommuna fyri mær, at klagarin tann 20. desember 2019 fekk at vita, at Tórshavnar kommuna varð farin at kanna virksemið á gøtuni. Kanningin hevur sum endamál at fáa staðfest, hvat virksemið verður framt í dag, hvørji loyvi fyriliggja, hvørja ávirkan virksemið hevur á økið sum heild, og hvørji stig skulu takast í mun til framtíðar virksemi á ognunum.

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um, at Tórshavnar kommunu ikki svarar einari klagu um vinnuligt virksemi í gøtuni, har klagarin býr, og um byggimálsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært góðum fyrisitingarsiði skulu slík mál viðgerast og svarast innan rímiliga tíð.

Klagarin sendir Tórshavnar kommunu klaguna tann 5. juli 2016 og sendir Tórshavnar kommunu 3 áminningarskriv tann 30. januar 2018, tann 27. september 2018 og tann 15. august 2019.

Ikki fyrr enn klagarin í áminningarskrivinum tann 15. august 2019 boðar frá, at A ætlar at klaga til mín, fær A svar frá Tórshavnar kommunu. Svarið er dagfest tann 16. august 2019, og klagarin hevði tá bíðað eftir svari frá Tórshavnar kommunu í yvir 3 ár.

Tórshavnar kommuna sigur í frágreiðing sínari til mín, at tað er sera óheppið, at klagarin ikki fær svar frá kommununi, hóast hann fleiri ferðir rykkir eftir svari, men at tað er ilt at siga, hvør orsøkin er til hetta, tí tað framgongur ikki av teimum skjølum, sum liggja í málinum.

Eg haldi tað als ikki vera nøktandi, at Tórshavnar kommuna hvørki svarar klaguni ella áminningarskrivum klagarans. At Tórshavnar kommuna ikki hevur eitt greitt boð um orsøkina til tess, kann vera tekin um, at kommunan ikki hevur eina nóg væl skipaða skráseting av innkomandi skjølum og teldupostum.

Hóast Tórshavnar kommuna í omanfyri nevnda tíðarskeiðið ikki svarar klagara, so fer Tórshavnar kommuna undir at kanna málið tann 12. juli 2016. Sambært upplýsingum í málinum er talan um, at starvsfólk frá kommununi eru á staðnum og skoða virksemið.

Soleiðis sum málið er lýst, er at kalla eingin viðgerð av málinum eftir hetta. Upplýst er, at gongd ikki kemur á málið fyrr enn tann 6. november 2018, tá Tórshavnar kommuna sendir eigaranum av vinnuliga virkseminum ein teldupost, har kommunan ynskir at fáa eina frágreiðing um virksemið, ið síðani skal latast kommununi innan eina viku. Hetta hendir aftaná at klagarin í tveimum umførum úrslitaleyst hevur sent kommununi áminningarskriv um sína klagu.

Tá eigarin av vinnuliga virkseminum ikki hevur latið kommununi frágreiðing sína, ið av røttum skuldi verið latin innan eina viku, sendir Tórshavnar kommuna tann 18. mars 2019 eigaranum av virkseminum eina áminning um, at kommunan framvegis onga frágreiðing hevur fingið frá

honum, og at hann skal lata kommununi hesa innan eina viku. Sambært upplýsingum í málinum verður frágreiðingin ikki latin Tórshavnar kommunu fyrr enn tann 4. november 2019. Tá er stívliga 1 ár liðið, síðan eigarin á fyrsta sinni fekk álagt at lata kommununi eina frágreiðing um virksemið hjá sær á ognini.

Tórshavnar kommuna hevur kommunalt byggieftirlit sambært løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a.

§§ 12 og 15 í lógini er soljóðandi:

> **§ 12.** Kommunala byggieftirlitið hevur eftirlitið við, at ásetingarnar í lógini og reglur og treytir, ásettar við heimild í lógini og kunngerðum, verða hildnar.
> *Stk. 2.* Fyri at fremja eftirlitið hava kommunala byggieftirlitið og løgreglan, við at vísa hóskandi samleikaprógv og uttan rættarúrskurð, atgongd til allar bygningar, ið eru fevndir av hesi lóg.
>
> **§ 15.** Staðfestir kommunala byggieftirlitið, at tað, sum bygt, umbygt, umvælt ella broytt er, ikki er í samsvari við ásetingarnar í lógini, reglur ásettar við heimild í lógini ella byggiloyvið, skal kommunala byggieftirlitið geva eigaranum boð um at fáa hesi viðurskifti í rættlag innan ávísa freist.
> *Stk. 2.* Um staðfestast kann, at viðurskiftini ikki eru fingin í rættlag, eftir at freistin sambært stk. 1 er farin, kann kommunala byggieftirlitið áseta nýggja freist.
> *Stk. 3.* Fylgir eigari ikki boðum sambært stk. 1 og stk. 2, kann kommunala byggieftirlitið skipa so fyri, at bøtt verður um feilir og manglar í bygninginum fyri eigarans rokning, ella at bygningurin verður niðurtikin.

Í § 20 í somu lóg er heimild at revsað við bót, um boð, ið eru givin sambært § 15, stk. 1 ikki verða fylgd.

Eg haldi tað vera sera átaluvert, at Tórshavnar kommuna sum eftirlitsmyndugleiki í kommunalum byggimálum, uttan haldgóða orsøk, ikki fer undir at viðgera málið veruliga fyrr enn tann 6. november 2018. Tá eru yvir 2 ár liðin síðan starvsfólk frá kommununi á fyrsta sinni skoðaðu virksemið á ognini.

Vísandi til omanfyrinevndu víðu heimild hjá kommunala byggieftirlitinum at fremja sítt eftirlit, haldi eg tað eisini vera sera átaluvert, at Tórshavnar kommuna letur stívliga 1 ár ganga frá tí at eigarin av virkseminum fyri fyrstu ferð tann 6. november 2018 fær álagt eina stutta freist at lata kommununi eina frágreiðing um virksemið hjá sær, til frágreiðingin tann 4. november 2019 loksins er kommununi í hendi.

Eg fari tí samanumtikið at geva Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum.

Av tí at eg haldi talan vera um, at álvarslig mistøk eru framd í hesum máli, fari eg sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini at kunna formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismannin í kommunumálum um hetta málið.

Burtursæð frá omanfyristandandi átalum og viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu

Løgtingsins umboðsmaður